


# Eingil í vesturbýnum

Kristin Steinsdóttir

Þóra Þóroddsdóttir týddi úr íslendskum
Myndir: Halla Sólveig Þorgeirsdóttir
Bókadeild Føroya Lærarafelags 2006
NÁM. Gunvá Magnussen og Lis í Jákupsstovu

# TIL LÆRARAN

Eingil í vesturbýnum

## Um bókina

*Eingil í vesturbýnum* er myndabók um dreingin Ask, sum veskur upp í Reykjavík. Hann býr í einum háhúsi saman við mammu sínari. Foreldrini eru skild og pápin býr í einum øðrum býlingi í Reykjavík. Askur er ein drongur, sum hugsar nógv, og partvís er søgan um tankar og hugleiðingar hansara. Vit fáa ongastaðni at vita, hvussu gamal Askur er, men onkrar hendingar í søguni benda á, at hann er 8-10 ára gamal. Onkrir av tankunum hjá Aski eru helst afturlítandi, tað kann tykjast sum hann er yngri enn 8 ár, m.a. í partinum *Høgguslokkur*. Sumt kann tykjast eitt sindur barnsligt, men aðrar tíðir er Askur rættiliga búgvin í hugsunarhátti, m.a. í partinum *Happing*.

Nógv evni verða viðgjørd, tað er ikki eitt nýtt evni á hvørjari opnu, men út ímóti. Onkuntíð verður tikið afturíaftur evnið. Sum heild verður ferðast millum evnini, men onkrar fylgjandi opnur hava sama evni.

Uppgávurnar eru gjørdar til 5.-6. fl. og meta vit, at arbeiðið tekur 3-5 vikur, tá ið arbeitt verður 4 tímar um vikuna.

## Uppgávur og arbeiðsgongd

Uppgávurnar eru bygdar upp eftir leistinum áðrenn tú lesur, meðan tú lesur og aftaná lesna. Ein uppgáva er til áðrenn tú lesur, hetta meta vit tekur ein undirvísingartíma. Síðan eru nakrar uppgávur til meðan tú lesur, hesar meta vit taka tveir undirvísingartímar hvør, møguliga er neyðugt við eitt sindur meira av tíð til seinastu av hesum uppgávunum. Restin av uppgávunum er til aftaná lesna, og meta vit, at tær taka 8 undirvísingartímar.

Vit vísa til upplesturin í KvF, har verður bókin býtt í 5 partar, nakrar opnur verða lisnar hvørja ferð. Hvør upplestur er uml. 10-12 min. Bókin hevur ikki síðutøl, og tí verður víst til opnur, sum hava ymisk heiti, sigast kann eisini, at hvør opna er ein partur.

Vit hava laga uppgávurnar eftir hesum 5 pørtunum, og tí verður ikki hvørja ferð farið í dýpdina við hvørjari einstakari opnu.

Uppgávurnar eru skipaðar bæði sum einstaklingauppgávur, makkarauppgávur og bólkauppgávur. Onkrar av uppgávunum leggja upp til prát í flokkinum og framløgur.

## Hví Eingil í vesturbýnum?

Vit fóru í holt við hetta arbeiðið, tí at vit halda, at tað manglar undirvísingartilfar til myndabøkur á føroyskum. Myndabøkur eru partur av samsetta tekstahugtakinum, sum er er eitt av førleikamálunum í námsætlanini í føroyskum.

Vit halda, at *Eingil í vesturbýnum* er ein spennandi myndabók, tí hon er eitt sindur øðrvísi, og her eru nógv góð og hóskandi evni at arbeiða við. Tekstur og myndir fortelja sum heild somu søgu, men á hvør sín hátt. Tað er ikki nógvur tekstur í bókini, og tí hava myndirnar stóran týdning fyri heildarupplivingina av bókini.

## Úr námsætlanini

Vit hava hugt í námsætlanina og meta at nomið verður við hesi førleikamál fyri 2.-6. fl.

*Talaða málið*

- *at nýta talumálið klárt og skilliga í t.d. kjaki, samrøðu, framløgu, verkætlan og leiki*
- *at lurta virkin og seta greinandi og metandi spurningar.*
- *at seta orð á egnar kenslur og hugsanir*
- *at nýta málið sum amboð í samrøðu, samstarvi, bókaframløgu, smáverkætlan og leiki*

*Skrivaða málið*

- *at skilja og greina ymiskar tekstir við grundleggjandi bókmentafrøðiligum hugtøkum*
- *at tekna, svara skrivligum spurningum ella á annan hátt vísa, at tað lisna er skilt*
- *at finna høvuðsinnihaldið í yrkis- og fagurbókmentaligum tekstum*
- *at gera skrivligar viðmerkingar til tað, hann hevur sæð, hoyrt ella lisið*

*Samansettir tekstir*

- *at tosa um fagurfrøðiliga leiklutin og endamálið við samansettum tekstum*
- *at skilja og greina ymiskar samansettar tekstir*
- *at tosa um, hvussu orð og mynd virka saman í myndabókum og øðrum myndamiðlum*